Ársfrágreiðing 2013/2014

Aðalfundurin 7. mai 2014

Ársfrágreiðing 2013/2014

Bústaðarviðurskiftir
Í løtuni hendir nógv á hesum økinum. MBF hevur havt tekningar til nýggjar íbúðir, sum Bústaðir skal byggja, til viðmerkingar, og hevur Jógvan Sofus Vágsheyg tikið sær av hesum arbeiði fyri MBF.

Eystan Heyg í Tórshavn verða íbúðir bygdar til fólk, sum eru sálarliga sjúk.

Bústaðir hevur keypt íbúðir á Heimasta Horn, har nakrar av hesum íbúðum, skulu leigast út til fólk, sum bera brek.

Í Sandoy verður bygdur ein umlættingardepil.

Almenna byggiætlanin til fólk, við menningartarni í Klaksvík og Runavík er farin av bakkastokki. Herumframt er Bústaðir, Klaksvíka og Runavíkar kommuna og Almannamálaráðið í gongd við eina byggiætlan til fyrrverandi næmingar á Rásini og onnur í líknandi støðu.

Almannaveitingar
Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk kom í gildi tann 1. Januar 2013.
Longu nú síggjast batar. Almannaverkið ferð í næstum undir eina royndarverkætlan innan BPA.
Ein bólkur, sum MBF hevur sett, hevur gjørt viðmerkingar til " Karmar fyri samstarvi við avvarðandi, og Brúkaraviðvirkan og samborgaraskapur".

Arbeiðsmarknaður
Ása Olsen er stýrislimur í Dugna. Skúlin við Áir hevur nú broytt sítt virksemi, og verður ein roynd gjørd, har FHS útbúgvingin verður niðurløgd og orkan nýtt til ein fyrireikandi flokk.

Fyri ung fólk, eru stórar avbjóðingar viðvíkjandi tí, at fáa eina útbúgving og at tryggja, at viðkomandi fær eitt starv eftir, at útbúgvingin er lokin. Hetta er eitt av høvuðsevnunum, sum MBF hevur viðgjørt í samband við arbeiðið við skuggafrágreiðing og ST- sáttmálan, og kemur MBF at arbeiða miðvíst við hesum umstøðum hjá ungum fólkum, sum bera brek.

Miðnámsútbúgving
Í fjør varð ein flokkur fyri næmingar sum hava autismu-spektrum órógv tikin upp á studentaskúlanum í Hoydølum.
Hetta sær út til at virka væl, og verður væntandi ein nýggjur flokkur tikin upp í summar.
MBF hevur havt "Lógaruppskot um broyting í LL. um gymnasialar miðnámsútbúgvingar til hoyringar. Lógarbroytingin leggur upp til, at møguleiki verður, at skipa miðnámsskúlatilboð til næmingar við skerdum førleika. Í viðmerkingum til lógaruppskotið stendur, at ætlanin er at fara undir eina tilgongd, sum eftir 8-10 árum fer at tryggja øllum næmingum í landinum, uttan mun til førleikar, eitt miðnámsskúlatilboð eftir loknan fólkaskúla.

ST- sáttmálin
MBFhevur gjørt eina skuggafrágreiðing saman við Danske Handikaporganisationer. Føroya Landsstýrið hevur sent eina frágreiðing til ST saman við donsku stjórnini, har tey siga, hvussu tey meta, at sáttmálin verður hildin í Føroyum. MBF hevur ummælt og mett um, hvussu Landsstýrið livir upp til tað, sum sagt verður í frágreiðingini hjá Landsstýrinum.
Skuggafrágreiðingin hevur av nýggjum sett gongd í kjakið um ST sáttmálan.
Í døgunum 14. og 15. apríl, vóru umboð fyri MBF í Geneve og løgdu fram skuggafrágreiðing viðvíkjandi ST sáttmálanum um rættindi hjá teimum, sum bera brek. Framløgan var í Palais Wilson, sum er høvuðssætið fyri mannarættindi hjá ST. Hetta var ein serstakur møguleiki fyri MBF, og er hetta fyrstu ferð, at ein føroysk skuggafrágreiðing er skrivað og løgd fram. Umboðsfólk hjá ST vóru fegin um eina væl skrivaða og upplýsandi frágreiðing.

Tað, sum hevði stóran týdning fyri MBF á ferðini til Geneve, var at fáa Føroyar settar á kortið og at siga frá, hvørjar brekpolitiskar avbjóðingar Føroyar hava.

Nú skuggafrágreiðingin er løgd fram, hava umboðsfólkini hjá ST gjørt tann sonevnda "list of issues", sum eru spurningar til politisku skipanina um, hvørji ítøkilig stig eru neyðug fyri at tryggja, at sáttmálin verður settur í verk í føroyska samfelagnum. Eisini skal hetta arbeiði ávirka, at lógir og aðrar skipanir í samfelagnum verða í samsvari við sáttmálan.

MBF fegnast um, at ST- nevndin hevur tikið fleiri av teimum mest átrokandi greinunum, sum MBF hevur víst á við.

Tað er greitt, at sambært "list of issues" eru tað nógv økir, har Landsstýrið og MBF hava ymiska fatan av, um og hvussu Landsstýrið livir upp til ST- sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

Fyri at tryggja, at ST- nevndin er so væl fyrireika sum gjørligt, tá Landsstýrið skal til viðgerðar, skal MBF saman við Danske Handicaporganisationer stutt og greitt greiða frá støðuni á teimum økjum, sum ST-nevndin hevur tikið við í "list of issues". Freistin hjá MBF er mánadagin tann 25. Mai.

Tann 22. Apríl var umboð fyri MBF á fundi í Uttanlandsnevndini, har uppskot var til viðgerðar, sum byggir á skuggafrágreiðingina. Uttanlandsnevndin var rættiliga jalig, og er onki at ivast í, at løgtings og landsstýrisfólk hava fingið nakað at hugsa um, nú skuggafrágreiðingin er send til ST.

Atkoma
Vága Floghavn hevur nú fingið lyftuna, sum skal tryggja, at fólk sum eru rørslutarnað sleppa undan at blíva borðin úr og í flogførini.
MBF hevur havt fund við "Visit Tórshavn" viðvíkjandi atkomu. Tey fara undir eina verkætlan, har tey skulu kanna atkomu møguleikarnar fyri fólk, sum sita í koyristóli. Ætlanin er, at allar kunningarstovurnar í Føroyum skulu verða við, soleiðis, at tey kunnu vegleiða fólki, sum ætla sær at ferðast í Føroyum. Talan verður um gistingarmøguleikar, møguleikar fyri, at fara út at eta og eisini møguleikar fyri, at luttaka í náttarlívinum og útferðarmál.

Gongd er í arbeiðinum við at skipa fyri skrivitulki.

Viðvíkjandi atkomu til tíðindi og sendingar hjá KVF eru vit ikki komin serliga langt. Eitt av punktunum í skuggafrágreiðingini til ST, vóru umstøðurnar hjá deyvum. Í 2014 er tað ikki nøktandi, at fólk, sum eru deyv, í fyrsta lagi fáa atgongd til tíðindi dagin eftir, at tey eru send í KVF. Tað er heldur ikki nøktandi, at so fáar sendingar verða deyvmálstulkaðar. Hesi mál kemur MBF framhaldandi at arbeiða við.
Á útbúgvingarøkinum, er tað ikki nøktandi, at deyv, sum ætla sær undir víðari lesnað, skulu bíða langa tíð eftir, at fáa teknmálstulk játtaðan, hesi viðurskiftir eru eisini við í skuggafrágreiðingini hjá MBF.

Fylgjara kort
MBF er í samráðingum við MMR og VMR, soleiðis, at fólk sum bera brek, kunnu fáa sama møguleika, sum eitt nú í Danmark, at fáa sonevnt fyljara kort.

Í løtuni kannar VMR møguleikan, at fylgjarin fær frían ferðaseðil við Starndfara skipunum og bygdaleiðum.

MMR kannar møguleikan fyri, at fylgjarin fær fría atgongd á stovnum/støðum, har MMR gevur eina játtan. Hetta er t.d. Norðurlandahúsið o.l.

Føroyar koma ikki undir EU regluna á hesum øki, tí at Føroyar eru ikki limir í EU.

HNR og NHR
MBF er limur í HNR. Ráðið hevur tveir fundir um árið, ein um várið og ein um heystið.

Eitt nýtt ráð hevur avloyst NHR, og byrjaðið nýggja ráðið síðsta heyst. Ætlanin er, at ráðið skal hava tveir fundir um árið.

Starvsnevndin
Starvsnevndin hevur dagligu umsitingina av MBF um hendi og verða øll viðkomandi mál tikin upp til viðgerar har. Starvsnevndin hevur umleið 1 fund um mánan, tó undantikið juli og desember.
Á fundi tann 30. Mai 2012, skipaði starvsnevndin seg við Jensu Heinesen sum næstformanni.
Tey, ið hava mannað starvsnevndina síðan seinasta aðalfund eru:
Carita Bjørklund, forkvinna
Jensa Heinesen, umboðandi medisinska bólkin
Sigrun Wardum, umboðandi sálarliga/neurologiska bólkin
Yvonna Hjaltalin, umboðandi Samskiftisbólkin (afasi)
Tóra við Keldu, umboðandi rørslubólkin.

Skrivstovan
Carita Bjørklund hevur verið forkvinna í Meginfelag teirra brekaðu síðan seinasta aðalfund. Á skrivstovuni starvast Ása Olsen, sum er dagligur leiðari , Diana Thomsen, ið er sett hálva tíð sum skrivstovufólk og Turið Thomsen reingerðarfólk.

Arbeiðsuppgávurnar á skrivstovuni eru sera nógvar og víttfevnandi. Frá vanligari umsiting av avlamisskeltum, hoyringsarbeiði í samband við lógarsmíð, broyting í lógum og kunngerðum til fundarvirksemi við limafeløg, stovnar og politiskar myndugleikar.

Nógv fólk venda sær til MBF við fyrispurningum av ymiskum slag. Men so vítt møguligt átekur MBF sær ikki einstaklingamál, uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. MBF metir eisini, at limafeløgini eru betur før fyri at loysa einstaklingamálini.

ST- sáttmálin og skuggafrágreiðing hava fylt nógv síðan seinasta aðalfund, og er frágreiðingin væl móttikin av politiska myndugleikanum.

Fíggjarviðurskiftir.
Stuðulin yvir fíggjarlógina fyri 2014 er 1,5 mill. Við støði í lóg um ítróttarvedding, fær MBF nú tillutað 5% av veddingarpengunum. Upphæddin fyri 2014 er enn ikki kunngjørd, men um støði verður tikið í 2013, hevði parturin hjá MBF verið umleið 500.000 kr. Hesin peningur kemur bæði MBF og limafeløgunum til góðar. Eisini fær MBF umleið 60.000 kr. frá FUR til ungdómsarbeiði.

Viðvíkjandi FUR, er støðan tann, at spurningur er reistur, um MBF hevur rætt til at vera limur í FUR og tí kemur MBF at taka spurningin upp á aðalfundinum tann 7. Mai.

Býtislykilin.
Sambært viðtøkunum hjá MBF, skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini, eftir at raksturin hjá MBF er frádrigin.

Lógararbeiði.
MBF fær nógv lógaruppskot til hoyringar. Vit hava skipað lógararbeiðið soleiðis, at allar lógir og kunngerðir, sum MBF fær til hoyringar, verða sendar út til øll limafeløgini. Feløgini hava møguleika at gera sínar viðmerkingar. Í flestu førum eru tað ongi ella bert einstøk feløg, ið hava sent okkum nakrar viðmerkingar.

Formansfundir.
Á aðalfundinum hjá MBF, sum varð hildin tann 7. Mai 2005, vóru lógirnar broyttar. Innihaldið í viðtøkubroytingunum gekk m. a. út uppá, at teir 4 bólkarnir skuldu framyvir bert nýtast sum grundarlag, at velja starvsnevndarlimir eftir, soleiðis at allir 4 bólkarnir vórðu umboðaðir í starvsnevndini. Sum nakað nýtt legði uppskotið upp til, at halda fastar formansfundir í minsta lagi 2 ferðir um árið.
Formansfundur var tann 23. Januar og tann 11. september 2013.
Á formansfundi tann 11. September 2013, vóru deildarstjórar úr Almannaverkinum og greiddu frá um nýggja bygnaðin og møguleikar eftir lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Møguleiki var hjá øllum at seta spurningar.

Onnur tiltøk.
MBF luttók á Fólkafundinum, sum var 20 til 21. September 2013, saman við hesum feløgum: Hjartafelagið, Alzheimerfelagið, Deyvafelagið, Parkinsonfelagið og Javni.

MBF betalti fyri básarnar, meðan limafeløgini skipaðu fyri egnum virksemi.

Tann 3. desember skipaði MBF fyri tiltaki í Norðurlandahúsinum saman við Ráðnum fyri Brekað og AMR.

MBF blaðið
Í 2013 kom eitt blað út.
Blaðið snúði seg um familjur, sum flyta av landinum, og vóru samrøður við familjur, sum eru fluttar og við onkra familju, sum er komin heimaftur.
Tað er Rit & Rák við Torfinn Smith, sum skrivar flestu greinarnar, og sum annars tekur sær av øllum viðvíkjandi útgávuni. Blaðið verður sent út til allar viðkomandi almennar og privatar stovnar og myndugleikar umframt til fólk, ið hava ynskt at fáa blaðið.

Eitt blað kemur út nú í vár. Stuðulin frá Tryggingarfelagnum Føroyar, sum var játtaður til 1 blað um árið er gingin út, og verður ikki játtaður framyvir.

Heimasíðan
Tað hevur stóran týdning, at hava eina aktiva heimasíðu. Tað er Diana Thomsen, sum umsitur heimasíðuna. Limafeløgini kunnu senda okkum boð um teirra fundir, sum vit so leggja út á heimasíðuna undir tiltøk.

Tænastur, Serflutningsskipan og Handikapskeltir.
Uppgávan hjá MBF viðvíkjandi Serflutningsskipan Landsins er løgd út til kommunurnar at umsita, og er óvist hvussu leingi stýrið fyri skipanina kemur at halda fram. MBF umsitur handikapskeltir, og eru umsóknir eftir handikapskeltum vaksandi.

Lógin og kunngerðir viðvíkjandi handikapskeltum verða væntandi klár í heyst.

Húsið
Í farna ári er Hjartafelagið flutt inn í hølini niðriundir, har Astma/Allergi felagið var.
Hølini har Psoriasisfelagið var eru tøk, og um onkur ynskir at leiga hølið, eru tit vælkomin, at venda tykkum til MBF skrivstovuna.

Í ár verður takið skift.

Umboðan í Ráðum og nevndum

Ráðið fyri brekað.
Formaðurin í MBF. Sum varalim fyri hana situr Ása Olsen, dagligur leiðari í MBF. Sum umboð fyri MBF situr harumframt Uni Rasmussen frá Blindafelagnum og Óli Wolles frá Javna sum varaumboð.

Ljóðbøkur
Margreta Næs hevur sitið sum MBF umboð í nógv ár, og virkar hon dagliga sum samskipari av arbeiðinum við at framleiða ljóðbøkur.

Ráðið fyri ferðslutrygd.
Herit Joensen, Vestmanna situr sum MBF umboð og hevur hon verið umboð í ráðnum í nógv ár.

FUR- Føroya Ungdómsráð
MBF hevur tvey umboð í FUR. Umboðini hjá MBF eru Katrin Dahl Hanusardóttir úr Diabetisfelag Føroya og Alda Nielsdóttir úr Hjartafelagnum.

Teknmálstulkatænastan
Endamálið hjá Teknmálstulkatænastuni er at taka sær av samskifti millum teknmálsbrúkarar og hoyrandi.
Tann 11.08.2006 varð reglugerðin fyri Teknmálstulkatænastuna broytt, so at nú hava hesi umboðan í stýrinum fyri Teknmálstulkatænastuna: Eitt umboð fyri teknmálstulkar, eitt umboð fyri Deyvafelagið og eitt umboð fyri Almannamálaráðið. Umboðið fyri Deyvafelagið skal vera tulkabrúkari.
Ása Olsen, dagligur leiðari umboðar Almannamálaráðið í stýrinum.
Sambært reglugerðini frá 2006, hevur MBF ikki beinleiðis umboðan í stýrinum.

Serflutningsskipanin.
Ása Olsen, dagligur leiðari í MBF situr sum MBF umboð og skrivari í stýrinum fyri Serflutningsskipanina. Óvist er, hvussu leingi hetta stýri kemur at halda fram, tí at skipanin er løgd út til kommunurnar at umsita.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin.
Fyri MBF situr Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari og leiðari á sambýlinum í Eysturstræti, og sum varalimur situr Súna Mørk, limur í nevndini í Sinnisbata.